# ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Mótmæla framferðini

*Síðani mentunarnevndin fyri knøppum mánaði síðani legði fram tilmæli um ikki at gera rennibreyt á Tórsvølli, hava fleiri áhugabólkar innan frælsu ítróttina gjørt vart við misnøgd sína hesum viðvíkjandi*



*At býraáðið nú hevur slept ætlanini um at gera rennibreyt kring Tórsvøll, hevur aftur skumpað undir kjakið hesum viðvíkjandi*

JÁKUP MØRK

Fyri stuttum kom av nýggjum rørsla í málinum um, hvørt rennibreyt eigur at verða gjørd kring Tórsvøll ella ikki.

Orsøkin til hetta var tilmælið, sum mentunarnevndin í Tórshavnar legði fram, og sum síðani varð samtykt av einum breiður býráðsmeiriluta.

### Ónøgd um mannagongdina

Mentunarnevndin mælti tá til, at eingin rennibreyt verður gjørd kring Tórsvøll, men at býráðið ístaðin eigur at leita eftir øðrum hóskandi stað at leggja rennibreytina.

Eftir at Sosialurin seinast í mars mánaði greiddi frá innihaldinum í tilmælinum frá mentunarnevndini, vóru fleiri áhugabólkar, sum yvir fyri býráðnum gjørdu vart við sína ónøgd hesum viðvíkjandi.

Í skrivum til býráðslimirnar varð heitt á hesar um at bera so í bandi, at tilmælið ikki varð samtykt, tí hetta eftir teirra tykki vildi viðført óbótaligan skaða fyri frælsa ítróttin.

Í einum av hesum skrivum varð ført fram, at umsitingin í býráðnum og nevndin í Bragdinum saman við deildarsambandinum fyri frælsan ítrótt á fundi í oktober mánaði 1999 vóru á fundi um hetta málið.

Sambært skrivinum, ið okkum kunnugt er latið øllum býráðslimum, var tá semja um at Býráðið skuldi gera eina meting av, hvat kostnaðurin av einari rennibreyt kring Tórsvøll var, sammett við kostnaðinum av eini rennibreyt í Hoydølum, sum hevur verið nevnt sum eitt alternativ.

Sambært skrivinum, sum varð sent býráðslimunum hin 4. apríl í ár, gav býráðið tá tað lyfti, at umboðini hjá frælsa ítróttinum skuldu kunnast um úrslitið av hesi kanning, áðrenn nakað meira hendi málinum. Kortini hevur Býráðið eftir hetta samtykt, at rennibreyt ikki skal vera á Tórsvølli, uttan at omanfyrinevnda kostnaðarmeting nakrantíð er gjørd.

### Ikki her og nú

Umframt at umboð fyri frælsu ítróttina hava gjørt vart við sína ónøgd yvir fyri býráðslimunum, gera tey í skrivinum vart við, at tey eru fullgreið um, at talan verður ikki um nakra rennibreyt her og nú. Hinvegin eru tey bangin um, at verður ætlanin viðvíkjandi rennibreyt um Tórsvøll slept, verður rennibreyt ongantíð gjørd í høvuðsstaðnum.

Umframt at umboð fyri frælsa ítróttin hava gjørt vart við sína ónøgd yvir fyri framferini hjá býráðnum í hesum máli, so hava eisini umboð fyri ítróttafeløgini í høvuðsstaðnum, fótbóltsfeløgini undantikin, skúlastjórar og umboð fyri Føroya Læraraskúla víst á, hvønn týdning ein rennibreyt hevur fyri ítróttaíðkarar í høvuðsstaðnum.

### Álitið stuðlar frælsu ítróttini

Í hesum sambandi er áhugavert at nevna, at álitið um mentan og list í Tórshavnar Kommunu, sum í gjár varð latið býráðslimunum, stuðlar upp undir sjónarmiðini hjá frælsu ítróttini.

Tikið verður ikki so harðliga til í álitinum, men hinvegin verður gjørt vart við, at »frælsi ítrótturin ikki fær sín rætta týdning, verður ikki veittur honum umstøður millum hinar stóru ítróttirnar, og verandi stadionøki ber ikki sítt navn av røttum, so leingi frælsi ítrótturin er útihýstur har.«

Hvønn týdning álitið hevur í framtíðar arbeiðssetningi kommununar kann kanska tykjast heldur ógreitt, men skulu hesi orð takast í álvara, er einki at ivast í, at rennibreytin verður veruleiki í framtíðini.

Okkum eydnaðist ikki at fáa orðið á Leiv Hansen, býráðsformann. Í røðu síni, tá álitið varð handað býráðsfomanninum, segði hann seg vera vísan í, at álitið fer at gera tað lættari hjá politakarunum at taka avgerðir innan mentanarpolitik.

Lesið eisini um ítróttin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# KÍ styrkir um hópin

*Gongst eftir ætlan, fáa klaksvíkingar á næstum tveir jugoslavar í leikarahópin*

JÁKUP MØRK

Í mun til undanfarna kappingarár er KÍ kanska tað liðið í fremstu deildini, sum hevur størsta partin av hópinum eftir.

Í so máta skuldi hetta boðað frá góðum fyri føroyameistararnr, sum fleiri hava spátt fara at endurvinna meistaraheitið.

### Saknur í Kurt

Einasta frágongdin, sum KI hevur havt, er á fremsta á aftasta plássinum, og tað er júst á hesum báðum plássum, at klaksvíkingar ætla at styrkja sær um hópin.

Í fótbóltur 2000, sum Sosialurin gav út fyri stuttum, greiddi Tomislav Sivic frá, at teir arbeiddu við ætlanum um at fáa fatur á tveimum útlendskum leikarum, og nú er líkt til, at hetta arbeiði er um at koma undir land..

Svend Jacobsen, formaður í KÍ, váttar fyri Sosialinum, at talan er um ein 23 ára gamlan áleypara, Srecko Milicevic, og ein 33 ára gamlan málverja, Zoltan Kujundzic sum skulu koma afturat leikarahópinum.

### Ov feskir

Svend Jacobsen ásannar, at nýggi álopsleikarin fyrst og fremst er ætlaður at yvirtaka álopssessin hjá Kurt Mørkøre.

- Ikki tí, vit hava fleiri ungar og sera evnaríkar leikarar til álopsplássini, men enn eru hesir kanska nakað feskir, og haraftur-at vilja vit ikki leggja ov stórar byrðar á herðar teirra alt fyri eitt, greiður Svend frá fyri Sosialinum.

Støðan á málmansplássinum er rættuliga meinlík. Eisini her eigur KÍ nakrar sera evnaríkar leikarar, men afturvendandi spurningurin er eisini her, um leikararnir ikki eru dekan ov ungir og óroyndir.

Umframt at spæla við, er ætlanin eisini, at málverjin skal virka sum málmansvenjari fyri besta mansliðið, og allar ungdómsdeildirnar, og á tann hátt vónar leiðsla felagsins, at jugoslavin eisini upp á longri sikt verður ein vinningur fyri felagið.

Áðrenn leikararnir kunnu knýtast endaliga at leikarahópinum, er tó neyðugt at innferðar- og arbeiðsloyvi verða fingin í rættlag, men nær hetta verður, veit KÍ formaðurin ikki at siga.



*KÍ venjarin, Tomislav Sivic, fær nú tveir landsmenn afturat sær í leikarahópin*

# Færri útlendingar enn í fjør

*Fyri fyrstu ferð í mong ár er líkt til, at talið av útlendskum leikarum í føroysku fótboltslandskappingini verður minni enn árið fyri*



*Í fjør gjørdu fýra lið nýtslu av útlendskum málverja, men higartil í ár er Waldemar hjá B71 einasti útlendingur á hesum plássi*

Tey seinastu árini er tað vorðið alt meira vanligt, at feløgini hava fingið sær fleiri og fleiri útlendskar leikarar í vón um at teir fóru at styrkja um á besta liðnum. Talið av fremandum monnum økti serliga um í fjør, tá ið tað bleiv loyvt at nýta fýra útlendingar í hvørjum felagi í staðin fyri tveir. Í 1999 spældu 26 fólk úr øðrum londum í føroysku 1.deild, sum gjørdist met higartil. Men í ár er talið av útlendingum er ikki so høgt kortini. Í dag eru 22 teirra (leikandi venjarar íroknaðir) skrásettir í 1.deildarfeløgum, og 20 vóru at síggja á vøllinum mánadagin.

Ellivu útlendingar, ið vóru við í kappingini-99, eru farnir av landinum. Ein (pólverjin Tomasz Przybylski) skal framhaldandi spæla við ÍF, men hesaferð í 2.deild, og møguliga fer venjarin hjá sumbingum Milan Cimburovic aftur at hjálpa sínum bygdarmonnum úr Royn í næstbestu deildini (jugoslavin býr í Hvalba). Hann leikti ein dyst við NSÍ í byrjanuni av kappingini í fjør. Ellivu fremmandir menn halda fram við somu liðunum, meðan tveir teirra hava skift felag (jugoslavin Tomislav Sivic og pólverjin Robert Cieslewicz). Hesin seinni er tann einasti ikki føroyingur, sum skoraði í 1.umfari. Hann gjørdi sigursmálið í Sumba fyri nýggja felag sítt, VB.

GÍ og NSÍ ætla sær als ikki at brúka útlendska arbeiðsmegi í 2000, men teir í HB (og eisini uppflytarar úr FS Vágum) gera tað fyri fyrstu ferð í langa tíð.

Bert ein málmaður (Waldemar Novicki úr Póllandi, ið á fótbóltshópi langt síðan er blivin føroyingur) er skrásettur í 1.deild í ár, í mun til fýra í 1999.

### Fimm út og fýra inn

Eingin leikari úr Danmørk, Onglandi, USA, Bulgaria og Ungarn spælir í føroysku 1.deild longur. Men fyri fyrstu ferð í søguni komu litavar henda vegin at spæla. Svenskarar høvdu ikki verið at hitt á fótbóltsvøllum í heimligu kappingum í Føroyum í nógv ár.

Merkisvert er, at av teimum átta feløgunum, ið hava lúttikið í 1.deild trý tey seinastu árini, bert tey bæði suðuroyarliðini, VB og Sumba, hava uppbrúkt tað loyvda talið av útlendskum leikarum í hvørjari kapping. Sumbingar høvdu tó bert tríggjar útlendingar á vøllinum í 1.umfari.

IE

**Útlendska umboðanin í 1.deild i 2000**

| | | |
|---|---|---|
| Jugoslavia | 7* | Sumba (4), VB (2), KÍ (1*) |
| Pólland | 5* | VB (2*), KÍ (2), B71 (1) |
| Litava | 4 | FS Vágar (4) |
| Rumenia | 3 | HB (2), B71 (1) |
| Brasil | 2 | B68 (2) |
| Svøríki | 1 | B36 (1) |

Feløgini ið hava útlendska umboðan í 2000

| | | |
|---|---|---|
| VB | 4* | Pólland (2*), Jugoslavia (2) |
| Sumba | 4 | Jugoslavia (4) |
| FS Vágar | 4 | Litava (4) |
| KÍ | 3* | Pólland (2), Jugoslavia (1*) |
| B68 | 2 | Brasil (2) |
| B71 | 2 | Pólland (1), Rumenia (1) |
| HB | 2 | Rumenia (2) |
| B36 | 1 | Svøríki (1) |
| GÍ | 0 | |
| NSÍ | 0 | |

* Leikandi venjarar eru íroknaðir

Á talvuni sæst, hvussu hava talið av fremmandum fótbóltsspælarum hevur verið í 1.deild síðan 1998.

| | 98 | 99 | 2000 |
|---|---|---|---|
| KÍ | 2 | 4 | 3* |
| GÍ | 1 | 1 | 0 |
| B36 | 2* | 3* | 1 |
| HB | 0 | 0 | 2 |
| NSÍ | 2 | 2* | 0 |
| B68 | 2 | 4 | 2 |
| VB | 3* | 2* | 4* |
| B71 | - | 3* | 2 |
| Sumba | 2* | 4 | 4 |
| TB | 2* | - | - |
| (ÍF) | 3* | 3 | - |
| (FSV) | - | - | 4 |
| í alt | 20* | 26* | 22* |

* leikandi venjarar eru íroknaðir

# Nýggj andlit í hvørjum felagið

*Sum tað plagar at vera í byrjan av hvørjum kappingarári, eru fleiri nýggj andlit í hvørjum felagi. Á talvuni síggjast allir leikarar, ið umboðaðu síni feløg í 1.umfari, men sum ikki spældu við hesum feløgum í 1.deild í 1999*

**B68, 6**

| | |
|---|---|
| Jan C. Dam | nýtt felag |
| Eyðstein Skipanes | nýtt felag |
| Øssur Hansen | afturkomin |
| Arnbjørn Danielsen | afturkomin |
| Jákup Eli Olsen | afturkomin |
| Súni Fríði Johannesen | afturkomin |

**HB, 5**

| | |
|---|---|
| Símun Eliasen | nýtt felag |
| Gheorghe Ciure | nýtt felag, debut í 1.deild |
| Florin Mihaescu | nýtt felag, debut í 1.deild |
| Janus Joensen | debut í 1.deild |
| Pætur Dahl | debut í 1.deild |

**B36, 5**

| | |
|---|---|
| Jens Martin Knudsen | nýtt felag |
| Magni á Lakjuni | afturkomin |
| Mikkjal Thomassen | afturkomin |
| Fróði Clementsen | afturkomin |
| Haakan Lundholm | nýtt felag, debut í 1.deild |

**VB, 3**

| | |
|---|---|
| Predrag Zivkovic | nýtt felag, debut í 1.deild |
| Robert Cieslewicz | nýtt felag |
| Eyðun Kjærbo | afturkomin |

**GÍ, 3**

| | |
|---|---|
| Óli Hansen | nýtt felag |
| Helgi L. Petersen | nýtt felag |
| Áslakur R. Petersen | nýtt felag |

**Sumba, 2**

| | |
|---|---|
| Eigil Olsen | nýtt felag, debut í 1.deild |
| Sasa Tomajek | nýtt felag, debut í 1.deild |

**B71, 2**

| | |
|---|---|
| Høgni Hansen | nýtt felag |
| Bernhard Petersen | nýtt felag |

**NSÍ, 2**

| | |
|---|---|
| Rúni Joensen | afturkomin |
| Djóni N. Joensen | afturkomin |

**KÍ, 1**

| | |
|---|---|
| Hjalgrím Elttør | debut í 1.deild |

* FS Vágar spældi seinast í 1.deild í 1997. Umframt fýra litavar, hava fleiri aðrir leikarar spælt í bestu deildini á fyrsta sinni.

ie